

**Agnes hevur fylgt dreyminum og gingið sínar egnu leiðir. Og júst leiðina til Føroya, og Suðuroynna, vónar hon, at alt fleiri við henni fara at velja.**

Hinvegin heldur hon, at nú vit eru kosin sum nr. 1 á listanum yvir óspilt oyggjasamfeløg í heiminum, er tað ein upplagdur møguleiki hjá okkum at gerast meira "grøn". - Ongin politiskur flokkur hevur enn promoverað seg sum ein grønan flokk, hetta haldi eg er ein seriøsur mangul, og leggur ikki upp til, at fólk gerast meiri tilvitað um nattúruna. Greið politisk stevnumið eru alneyðug. Um vit ikki skulu hava náttúruna, sum okkara stórsta tilfeingi, hvat hava vit so at bjóða ferðafólki uttanífrá eins og okkara egnu. Hví so koma aftur hendavegin og seta búgv. Vit mugu raðfesta náttúruna høgt. Eitt nú síggja vit ofta byggiætlanir fara í gongd, har arbeiði so brádliga verður steðgað, tí loyvini ikki eru í lagi. Her mangla aftur greið stevnumið. Og onki annað land, í verðini, hevði góðtikið, at náttúran var fyri slíkari niðurpíning, sum okkara, orsakað av seyði. Um vit hálveraðu seyðastandin, hevði grasið kanska kunnað komið fyri seg, og tær urtir, ið ætla at koma upp, høvdu kanskað sloppið.

### Hevur fylgt dreyminum

Agnes hevur fylgt dreyminum og gingið sínar egnu leiðir. Og júst leiðina til Føroya, og Suðuroynna, vónar hon, at alt fleiri við henni fara at velja.

– Vit standa á gáttini til eina kollvelting á politiska økinum. Fyri fyrstu ferð uppliva vit, at politisku flokkarnir promovera seg við kvinnum á listunum, og hava tað sum eitt evni. Eisini samanlegging av smáum eindum er eitt nýtt fyribrygdi. Hetta er sera positivt, og roknast kann við, at tey, sum velja at flyta heimaftur, eru ressourcesterk fólk, ið veruliga ynskja broytingar, og at uppbyggja nakað. Og kanska hava vit eina ábyrgd, okkara ættarlið, ið hevur fingið so góðar útbúgvingarmøguleikar, at koma aftur hendavegin. Tað er trupult, um ein ynskir sær karrieru og at vinna nógvar pengar, men um áhugin er at byggja sítt egna upp, eru Føroyar, og serliga Suðuroyggin, helst eitt sera gott boð, sigur Agnes.

## Kvinnur í Suðuroy

Manglandi kjak her suðuri, um okkara støðu í samfelagnum, er orsøkin til hesa greinarøð, grundað á samrøður við seks kvinnur í Suðuroynni. Vit eru ikki von við at spíðska pennin og siga okkara hugsan alment. Og als ikki kvinnurnar. Men nógvar hava hugsanir og meiningar um, hvussu vit í framtíðini møguliga kunnu koma burturúr hesi støðuni við stagnatión og fráflyting. Kvinnurnar eg hitti eru: Súnhild Holm, Anna B Samuelsen, Annika Næs Johannesen, Agnes Mols Mortensen, Aggi Ásgeirsdóttir og Kirsten Strøm Bech. Hetta er fjórði partur.

Sosialurin